KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 16.11.2017 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

Varalimir: Kjartan á Gravarbø møtti fyri Kristian Eli Zachariasen

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
119/17	17/01366-3	Býráðslimur burturstaddur - Kristian Eli Zachariasen
120/17	17/00834-30	Fíggjarætlan 2018, Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*
121/17	10/00682-78	Neystagrundir í Árnafirði; betonggrund og broyting í matriklum
122/17	17/01223-2	Uppískoytisstykki til matr. nr. 759i – Búnaðarstovan
123/17	11/00134-53	Mentanarhúsið í Klaksvík; stuðulsjáttan 2017 – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
124/17	17/00078-8	Fíggjarætlan 2017, mentanarøkið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
125/17	17/00505-9	Barnatannrøktin, hølisviðurskifti – *eykajáttan, seinna viðgerð*
126/17	17/00687-8	Børn við avbjóðingum; serdeild undir Snjallubjallu – *eykajáttan, seinna viðgerð*
127/17	17/01289-5	Býráðslimi berst frá at røkja starvið í meira enn 14 dagar - Beinta Klakstein

119/17
17/01366 Býráðslimur burturstaddur - Kristian Eli Zachariasen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	16.11.2017	119/17	

Frágreiðing um málið:
Kristian Eli Zachariasen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann er burturstaddur í tíðarskeiðinum 7. til 21. nov. og tí ikki fær møtt til býráðsfundin 16. nov. 2017. Biðið verður samstundis um, at næstvaldi á valevnislistanum fær fundarboð vísandi til § 18, stk. 2 í Kommunustýrislógini (KSL).

Lógargrundarlag:

KSL, § 18, stk. 2 og 3:

Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Einmælt samtykt, at lata næstvalda á valevnislistanum, Kjartan á Gravarbø, taka sæti fyri Kristian Eli Zachariasen.

120/17
17/00834 Fíggjarætlan 2018, Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	16.11.2017	120/17	

Frágreiðing um málið:
Á felags nevndarfundi (temafundur II) 2. nov. 2017 varð samtykt niðanfyri standandi fíggjarætlan fyri 2018 (í 1.000 kr):

Inntøkur	270.000
Rakstur	187.000
Rakstrarúrslit	83.000
Rentustuðul	4.000
Rentur	4.400
Íløgur	72.600
Avdráttir	2.000
Úrslit eftir avdráttir	0

Tær samlaðu inntøkurnar eru mettar til 270 mió. kr. Persónskatturin 208 mió. kr., sum er ein vøkstur á 8 mió. kr. svarandi til 4,0 %. Partafelagsskatturin er mettur til 16 mió. kr. Í inniverandi ári verður roknað við, at partafelagsskatturin verður umleið 20 mió. kr.
Metingin um skatt av eftirlønargjøldum og endurgjald ísbv. frádráttir byggir á upplýsingar frá Fíggjarmálráðnum.

Roknskapur og fíggjarætlan 2017-2018		
1.000 kr.	Meting Roknsk.	F.ætlan
Inntøkur	2017	2018
Kommunuskattur	-200.000	-208.000
Felagsskattur	-20.400	-16.000
Skattur av eftirlønargjøldum	-32.600	-35.133
Flyting ísbv. Fráttir FAS, DIS v.m	-12.400	-10.867
Inntøkur tilsamans	-265.400	-270.000

Á niðanfyri standani talvu eru tær samlaðu rakstrarútreiðslurnar á 187 mió. kr. vístar á greinar. Talan er um eina vøkstur frá umleið 180 mió. kr. í 2017 til 187 mió. kr. í 2018, svarandi til 3,9 %. Tá ið útreiðslurnar til rentustuðul og annar fíggjarkostnaður verða tikin við, verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar 195,4 mió. kr. samanborið við 192,8 mió. kr. í 2017, svarandi til ein vøkstur á 1,4 %. Í hesum sambandi skal tó hædd takast fyri, at íroknað fíggjarkostnaði fyri 2017 er eitt staðfest kurstap á 4,9 mió. kr. Um hædd verður tikin fyri hesum, er talan um ein vøkstur á 3,9 % í samlaðu rakstrarútreiðslunum

Fíggjarætlan 2018			
		Meting Roknsk.	F.ætlan
	1.000 kr	2017	2018
§1	Kommunal fyrisiting	19.980	20.572
§2	Almanna- og heilsumál	69.190	73.199
§3	Børn og ung	37.536	39.029
§4	Útbúgving og gransking	9.392	9.624
§5	Mentan og frítíð	11.776	11.801
§6	Teknisk mál	19.797	20.104
§7	Kommunalt virki	13.184	12.672
	Rakstrarútreiðslur	180.855	187.000
	Rentustuðul	3.800	4.000
	Rentuútreiðslur	8.100	4.400
	Rakstrarútreiðslur tils.	192.755	195.400
	Inntøkur	-265.400	-270.000
	Rakstrarúrslit	-72.645	-74.600
	Íløgur	77.148	72.600
	RLÚ	-4.503	2.000

Við hesum fyritreytum verður rakstrarúrslitið 74,6 mió. kr. samanborið við eitt mett rakstrarúrslit í 2017 á 72,6 mió. kr.

Samlaði íløgukarmurin er settur til 72,6 mió. kr. og avdráttir til 2 mió. kr.

Lógargrundarlag:
Kommunulógin og roknskaparverk fyri kommunurnar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at býráðið samtykkir tað av nevndunum 2. nov. 2017 samtykta uppskot til fíggjarætlan 2018 hjá Klaksvíkar kommunu.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Atkvøtt varð um felags tilmælið frá nevndunum 02-11-2017 (temafundur II); tilmælið varð einmælt samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sostatt er **fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2018** samtykt við hesum tølum (í 1.000 kr):

Inntøkur	270.000
Rakstur	187.000
Rakstrarúrslit	83.000
Rentustuðul	4.000
Rentur	4.400
Íløgur	72.600
Avdráttir	2.000
Úrslit eftir avdráttir	0

Íløgurnar verða soleiðis útgreinaðar (í 1.000 kr):

Á Skúlatrød	20.000
Spillivatn/hitaskipan	4.000
Fastognir	2.000
Vegir, íløga	5.000
Byggibúning, bústaðir	3.000
Byggibúning, miðbýur	6.600
Mentanarpallur	6.000
Rennibreyt	9.000
Fótbóltsvøllur	2.000
Havna- og vinnuøkið	2.500
Nýggj eldrapláss	3.000
Nýggjur barnagarður	500
Ídnaðarøki á Borðoyarvík	5.900
Spæliland	1.000
Spælipláss, Jørundsgøta	100
Íverksetarahúsið	500
Maskinur	500
Spinnaríið	1.000
Samanlagt	72.600

Harumframt einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti á 20,75 %** og einum **barnafrádrátti á 5.500 kr.**

121/17
10/00682 Neystagrundir í Árnafirði; betonggrund og broyting í matriklum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	06.11.2017	45/17	
2 Fíggjarnevndin	14.11.2017	129/17	
3 Klaksvíkar Býráð	16.11.2017	121/17	
4 Árnafjarðarnevndin	23.11.2017		

Frágreiðing um málið:
Í 2012 varð farið undir at spreingja og grava út fyri neystagrundum í Árnafirði. Striltið gekk at fáa byggibúningararbeiðið liðugt, men nú er samtykta málið um neystagrundirnar komið undir land. Tó eru neystagrundirnar ikki útlutaðar enn.

Áðrenn farið verður víðari við málinum, fer umsitingin at heita á viðkomandi nevndir og býráð, um at viðgera tríggjar spurningar, sum eru reistir síðani seinastu viðgerð av málinum:

Spurningur 1
Broyttir matriklar. Ynski er, at longdin á neystunum verður broytt úr 10 metrum til 11 metrar. Breiddin verður tann sama, 5 metrar. Upplýst verður, at Umsitingin kann viðmæla hesum.

Spurningur 2
Sambært samtyktu ætlanini er kostnaðurin fyri neystagrundirnar kr. 61.500,- fyri byggibúningararbeiðið umframt vanligt leigugjald sambært standard sáttmála. Talan eru um 11 neystagrundir, har tann eina grundin verður latin sum endurgjald fyri annað neyst.

Nú er skotið upp, at kommunan letur stoypa upp allar betongveggir og fyllir upp millum vegin og neystini. Nevnda arbeiði verður síðani tikið við í sølukostnaðin fyri neystagrundirnar. Møguligur avlopspeningur frá søluni verður brúktur til liðugtgerð av neystavegi og parkeringsplássi. Sí niðanfyristandandi roknistykkið:

Goldin kostnaður av byggibúningini:	kr.	676.500,-
Kostnaður av betongarbeiði og uppfylling:	kr.	1.300.000,-
Samlaður kostnaður:	kr.	1.976.500,-

Sambært hesum skulu neystagrundirnar seljast fyri uml. 180.000,- kr. pr. stk. *(samlaður kostnaður kr. 1.976.500,- at býta við 11 neystagrundir).*

Sølukostnaður *(kr. 180.000,- x 10)*:	kr.	1.800.000,-

Kostnaður av betongarbeiði og uppfylling:	kr.	1.300.000,-
Avlop at nýta til liðugtgerð av neystavegi og parkeringsplássi	kr.	500.000,-

Gjørt verður vart við, at betongarbeiðið og uppfylling fyri tað 11. neystið er tikið við í kostnaðin men ikki í søluna. Í hesum sambandi kunnu vit upplýsa, at verkætlanin krevur, at arbeiðið verður tikið við, men ivasamt er, um kommunan kann krevja inn kostnaðin, vísandi til at talan er um umbýti – kommunan ognaði sær neyst frá privatum eigara, og eftirkomarar hava fingið aðra neystagrund. Upplýst verður, at umsitingin kann viðmæla hesum.

Spurningur 3
Vísandi til málið um útlutan av neystagrundum verður heitt á nevndina um at útgreina, hvat meint verður við, tá HaVN samtykkir, at borgarar við tilknýti til Árnafjørð skulu hava forrætt til eina neystagrund.
Í hesum sambandi kunnu vit upplýsa, at hetta er støðan/status í oktober 2017:

Nr.	Navn	Telefon	Bústaður	Umsókn dagf.	Mál nr.
1	Niclas Justinussen	554008	Árnafjørður	2004	
2	Gertrud Váðklett	215331	Klaksvík	2007	
3	Thormund Johannesen	229226	Tórshavn	2011	11/00073
4	Guttorm Olsen	506338	Árnafjørður	2011	11/00469
5	Gudny Mortensen	222261/456261	Klaksvík	2012	12/00799
6	Ingun og Rúni Heinesen	456488	Klaksvík	2015	15/00531
7	Jórun Andreasen	457333	Klaksvík	2016	16/00409
8	Kristian L. Samuelsen		Klaksvík	07.05.2016	16/00541
9	Jóhan Sólheyg		Klaksvík	31.10.2016	16/01153
10	Eyðbjørn Poulsen		Klaksvík	04.01.2017	17/00050
11	Oddbjørg A. Sigurðsson		Klaksvík	31.08.2017	17/00965

Bygging og freistir:
Umsitingin mælir til, at byggingin verður framd eftir sama prinsippi sum neystaøkini á Strond. Mælt verður eisini til at seta freistir á, nær neystið skal vera innilokað, og um hetta ikki er gjørt, at so verður rætturin latin víðari til annan, og peningurin afturgoldin. Mælt verður eisini til, at byggitíðin fyri at inniloka neystið verður sett til eitt ár, og at lutakast verður um neystagrundirnar.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar/støðutakan.

Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at Árnafjarðarnevndin hevur sína viðgerð av málinum 23. november 2017. Tí ímyndar umsitingin sær, at málið verður viðgjørt av HaVN, FíN og Býráðnum nú, men ikki avgreitt fyrr enn tað eisini er viðgjørt av Árnafjarðarnevndini.

HaVN 06-11-2017

Spurningur 1

Nevndin tekur undir við, at longdin á neystunum verður broytt úr 10 metrum til 11 metrar. Breiddin verður tann sama, 5 metrar.

Spurningur 2

Nevndin tekur undir við, at kommunan letur stoypa upp allar betong veggir, og fyllir upp millum vegin og neystini. Nevnda arbeiði verður síðani tikið við í sølukostnaðin fyri neystagrundirnar. Møguligur avlopspeningur frá søluni verður brúktur til liðugtgerð av neystavegi og parkeringsplássi. Sí niðanfyristandandi roknistykki:

Goldin kostnaður av byggibúningin:	kr.	676.500,-
Kostnaður av betong arbeiði og uppfylling:	kr.	1.300.000,-
Samlaður kostnaður:	kr.	1.976.500,-

Spurningur 3

Nevndin samtykti at borgarar við føstum bústaði í Árnafirði, hava forrætt og harnæst borgarar við føstum bústaði í Klaksvíkar kommunu, at fáa boðið neystagrund.

FíN 14-11-2017

Nevndin tekur undir við HaVN 06-11-2017.

Býráðsins samtykt 16-11-2017

Tilmælið frá FíN 14-11-2017 einmælt samtykt.

122/17
17/01223 Uppískoytisstykki til matr. nr. 759i - Búnaðarstovan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	06.11.2017	94/17	
2 Klaksvíkar Býráð	16.11.2017	122/17	

Frágreiðing um málið:

Víst verður til skriv frá Búnaðarstovuni, dagf. 17. okt. 2017, har biðið verður um býráðsins ummæli til, at Elsa Joensen, Sornhúsgøta 10, fær til keyps lutin – matr.nr 759a – sum liggur millum ogn hennara (matr. nr. 759i) og Mækjuveg.

Byggisamtyktarliga er talan um økispart A10 (Blandað íbúðar- og vinnuendamál), galdandi fyri báðar matriklarnar.

Fíggjarligar avleiðingar:

Ongar – kommunan bert tilmælandi partur.

Tilmæli:
Umsitingin hevur ongar viðmerkingar til, at umrøddi partur av festijørðini matr. nr. 759a verður seldur til samanleggingar við matr. nr. 759i, men ger samstundis vart við, at við at selja til privatan keypara verður ikki longur alment atgongt millum eystara og vestara part av festijørðini hjá matr. nr. 761a.



UBN 06-11-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 31-10-2017

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Tilmælið frá UBN 06-11-2017 einmælt samtykt.

123/17
11/00134 Mentanarhúsið í Klaksvík; stuðulsjáttan 2017 – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	14.11.2017	134/17	
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	16.11.2017	123/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	14.12.2017		

Frágreiðing um málið:
Í samband við verkætlanina Mentanarhúsið í Klaksvík er í 2017 játtað 6.750 td. kr. til hesa verkætlan. Upphæddin er bókað sum ein íløgujáttan á konto *Mentanar- og samkomuhús*. Talan er um ein íløgustuðul, tí at Mentanarhúsið er ein sjálvsognarstovnur. Tí er neyðugt at umbóka ta brúktu játtanina sum íløgustuðul. Restin skal framflytast.

Spurningurin er, um tað ikki hevði verið ein betri loysn at flutt játtanina til Mentanarhúsið í staðin fyri at framflyta ikki brúkta játtan.

Samanlagt hevur býráðið givið tilsøgn á 38 mió. kr. til Mentanarhúsið, Húsarhaldsskúla Føroya og Spinnaríið. Av hesi upphædd eru 15 mió. kr. til verkætlanina Mentanarhúsið í Klaksvík.

Í skrivi dagf. 1. nov. 2016 hevur kommunuan sent skriv til grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík við fylgjandi treytaðari tilsøgn:

Fíggjarnevndin og býráðið hava viðgjørt áheitanina og hava samtykt fylgjandi treytaðu tilsøgn:

Klaksvíkar býráð er sinnað

- *at veita grunninum Mentanarhúsið í Klaksvík ein treytaðan íløgustuðul á 15 mió. kr.,*
- *ein árligan rakstrarstuðul á 300 tús. kr.,*
- *at leiga umleið 600 fermetrar av bygninginum til býráðshøll, móttøku og annað virksemi.*
- *Leigugjaldið verður ásett eftir vanligum treytum, ið eru galdandi fyri slík leigumál.*
- *Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er liðug í august/september 2019; skilt á tann hátt, at bygningurin lýkur øll myndugleikakrøv.*

Sum tað sæst, er ein treyt í tilsøgnini, at stuðulin fyrst verður útgoldin, tá ið verkætlanin er liðug og lýkur øll myndugleikakrøv. Talan er tí um, at kommunan víkur frá hesi áseting.

Samlaða verkætlanin verður mett til 40-45 mió. kr. Tí má roknast við, at grunnurin skal útvega fígging til ein part av verkætlanini. Støðan kann tí blíva tann, at kommunan skal gjalda 15-20 mió. kr í stuðli.

Nevnast skal, at fyri kortum hava fundir aftur verið við LOA-fondin, sum nú hevur meldað út, at teirra umsiting hevur gjørt eitt tilmæli til nevndina um at stuðla Mentanarhúsinum í Klaksvík við 10 mió. kr. Væntað verður, at endalig niðurstøða fyriliggur seint í ár.

Í samband við víðari arbeiðið við mentanarhúsinum hevði tað verið ein avgjørdur fyrimunur, at tann játtaði stuðulin verður avroknaður til grunnin leypandi fyri hvørt fíggjarár.

Fyri at tryggja at stuðulin verður brúktur til endamálið, ið er íløga til nýtt mentanarhús, verður útgjaldið treytað av, at stýrið skipar fyri, at kvartárlig uppgerð verður send fíggjarnevndini hjá Klaksvíkar kommunu. Uppgerðin skal útgreina nýtsluna av stuðulinum, ið svarar til útgreingingina í byggiroknskapinum, soleiðis at fíggjarnevndin í Klaksvíkar kommunu fær vissu fyri, at stuðulin verður brúktur til at fremja verkætlanina Mentanarhús í Klaksvík.

Landið brúkar sama framferðarhátt, tá tey gjalda út stuðul til eitt nú Húsarhaldsskúla Føroya og væntandi eisini til eftirskúlan í Suðuroy.

Sum nevnt í byrjanini eru í 2017 játtaðar 6.750 td. kr., og eru brúktar 503 td. kr. í árinum. Talan verður tí um at flyta 6.250 td. kr. til grunnin. Samlaða játtanin verður roknskaparliga flutt frá íløgum til íløgustuðul, sum verður bókað upp í raksturin.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Kommunulógin og roknskaparverk fyri kommunurnar.

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Talan er um, at tøki peningurin hjá kommununi minkar við 6.250 td. kr. Í inniverandi ári er peningur avsettur til endamálið. Tí er ikki talan um meirnýtslu, einans ein forskjóting í likviditetinum.

<u>Tilmæli:</u>
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við, at stuðulin verður goldin út, so hvørt býráðið setir pening av til verkætlanina Mentanarhúsið í Klaksvík, og at alt verður bókað undir "íløgustuðul".

FíN 14-11-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-11-2017.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Tilmælið frá FíN 14-11-2017 einmælt samtykt; útgjaldið fyri 2018 skal leggjast fyri býráðið, áðrenn tað verður goldið út.

124/17
17/00078 Fíggjarætlan 2017, mentanarøkið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	07.11.2017	66/17	
2 Fíggjarnevndin	14.11.2017	132/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	16.11.2017	124/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	14.12.2017		

Frágreiðing um málið:
Í samband við at umsóknir um tiltøk o.a. eru játtaðar í árinum, hevur umsitingin mett um samlaðu nýtsluna við árslók 2017. (nýtsla í mun til játtan)

Í løtuni verður mett, at samlaða nýtslan innan § 5 verður, sum talva niðanfyri vísir. Viðmerkjast skal, at onkrar tilsagnir eru ikki útgoldnar/avgreiddar enn, og tí kunnu broytingar framvegis koma fyri.

	Roknskapur		Fíggjarætlan	Frávik	Meting
	31-10-2017		2017	2017	2017
§5 Mentan og frítíð	**9.255.364,87**	**87%**	**10.691.000,00**	**500.000,00**	**11.191.000,00**
05235170010 Tónlistaskúlin	987.072,41	66%	1.492.000,00	25.000,00	1.517.000,00
05235270020 Kvøldskúlin	183.245,28	50%	366.000,00	0,00	366.000,00
05235270022 Vevskúlin	28.941,03	41%	71.000,00	-15.000,00	56.000,00
05235270024 Handarbeiðsskúlin	234.803,29	99%	237.000,00	0,00	237.000,00
05241370030 Jóla- og nýttárshald	65.815,52	36%	185.000,00	30.000,00	215.000,00
05241370032 Norðoyastevnan	180.076,60	90%	200.000,00	-20.000,00	180.000,00
05241370033 Dávavirkið	358.147,77	78%	460.000,00	0,00	460.000,00
05241370034 Ym. tilboð/tiltøk mentan/frítíð	310.369,03	48%	650.000,00	0,00	650.000,00
05241370040 Summarfestivalur/Sjómannadagur v.m.	557.313,55	117%	475.000,00	95.000,00	570.000,00
05241470036 Stuðul til ítrótt	140.083,20	102%	137.000,00	40.000,00	177.000,00
05241470038 Stuðul til mentan	1.733.612,30	84%	2.061.000,00	50.000,00	2.111.000,00
05243170040 Bókasavnið	1.512.981,91	110%	1.377.000,00	-25.000,00	1.352.000,00
05246170088 Svimjihøllin	1.776.983,28	94%	1.883.000,00	175.000,00	2.058.000,00
05246270030 Ítróttarhallir	713.825,98	96%	744.000,00	0,00	744.000,00
05246270090 Stadionøkið	472.093,72	134%	353.000,00	145.000,00	498.000,00

Umsóknir um stuðul til Gittarting, Eymaleik og Bókaútgávu hjá Sprotanum eru samtyktar av nevndini seinasta umfar.

Viðmerkjast skal, at flestu tilsagnir eru givnar í samráð við avvarðandi nevndarformann og borgarstjóra, og í samráð við hesar verður nú biðið um, at fíggjarætlanin verður tillagað við hesum metingum sum grundarlag. Upplýsast skal, at umsitingin í sínum uppgerðum av nýtslu í mun til játtan í august kunnaði nevndina um væntaða meirnýtslu á kr. 495.000,- innan økið "mentan og frítíð"

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlanin 2017

Fíggjarligar avleiðingar:
Tillaging av fíggjarætlan § 5 við kr. 500.000,-

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir málinum og tillaga samlaða raksturin innan § 5 við kr. 500.000,-

MeN 07-11-2017
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Atli S. Justinussen og Óli M. Lassen, tekur undir við tilmæli 31-10-2017 frá umsitingini og vísir á, at ítøkiliga játtan til hvørt einstakt mál má framganga í tilmælinum framyvir.
Ein minnniluti, Gunvá við Keldu, mælir til at halda játtanina og gera sparingar í rakstrinum í grein 5.

FíN 14-11-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Beinta Klakstein, tekur undir við meirilutanum í MeN 07-11-2017.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við minnilutanum í MeN 07-11-2017.
Herfrí J. Sørensen tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í MeN 07-11-2017 og FíN 14-11-2017; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kjartan á Gravarbø, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Atli S. Justinussen) og 3 ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen og Steinbjørn O. Jacobsen) og einari blankari atkvøðu (Herfrí J. Sørensen).

125/17
17/00505 Barnatannrøktin, hølisviðurskifti – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	47/17	
2 Fíggjarnevndin	24.10.2017	118/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	26.10.2017	96/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	16.11.2017	125/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 26. oktober 2017.

TrN B&U 17-10-2017
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 11.10.17.

FíN 24-10-2017
Nevndin tekur undir við TrN B&U 17-10-2017.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

126/17
17/00687 Børn við avbjóðingum; serdeild undir Snjallubjallu – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	43/17	
2 Fíggjarnevndin	24.10.2017	119/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	26.10.2017	97/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	16.11.2017	126/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 26. oktober 2017.

TrN B&U 17-10-2017
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

FíN 24-10-2017
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2017.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Beinta Klakstein luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið, dagf. 9. okt. 2017, einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Beinta Klakstein luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

127/17
17/01289 Býráðslimi berst frá at røkja starvið í meira enn 14 dagar - Beinta Klakstein

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	16.11.2017	127/17	

Frágreiðing um málið:
Beinta Klakstein, býráðslimur, hevur tann 20. okt. 2017 boðað borgarstjóranum frá, at hon ynskir at sleppa undan býráðsarbeiðinum frá 1. des. 2017 til 1. mars 2018, tvs. meira enn samfullar 14 dagar.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin § 18, stk. 2

  Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.

- Reglugerð fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndir býráðsins, § 6 (Langtíðar frávera), frá 22. mars 2011

  Um býráðslimur fær forfall ella søkir um farloyvi í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 2 mánaðar, tekur næsti persónur á viðkomandi vallista sæti bæði í býráðnum og sum limur/varalimur í teimum nevndum, har býráðslimurin, sum fer í farloyvi, er limur/varalimur.

  Eru ongar orsøkir til iva um heimildina fyri einum langtíðar farloyvi, kann borgarstjórin skipa fyri, at næsti persónur á viðkomandi vallista tekur sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi, og síðan verður farloyvið eftirfylgjandi lagt fyri fyrst komandi býráðsfundin til samtyktar og staðfestingar.

  Um tað hinvegin eru orsøkir til iva um onkur viðurskifti í sambandi við umsóknina um langtíðar farloyvi, verður bíðað við at kalla næsta persón á viðkomandi vallista inn í sambandi við nevndarfundirnar, til málið um farloyvið er viðgjørt og samtykt av býráðnum. Eftir tað tekur vara-býráðslimurin sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi.

Tilmæli:
Verður lagt fyri býráðið til samtyktar og staðfestingar.

Býráðsins samtykt 16-11-2017
Beinta Klakstein og Kjartan á Gravarbø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

Eimælt samtykt og staðfest, at næstvaldi á valevnislistanum, Kjartan á Gravarbø, tekur sæti í nevndum og býráði fyri Beintu Klakstein í fráverutíðarskeiðinum.